## Ov nógvar vindmylluætlanir

Í Noregi er stórur áhugi fyri at útbyggja vindorkuna, men nú ger orkustýrið vart við, at áhugin er vorðin í so stórur. Ráðið sigur, at meginkervið klárar ikki at taka alla ta orkuna, sum tær nógvu vindmyllurnar høvdu givið, og tí hevur ráðið gjørt av at leggja meiri enn aðru hvørja verkætlan til viks. Ráðið sigur, at í 2025 verður meginkervið ført fyri at taka 20 TWh frá vindmyllum, men at tær nógvu verkætlaninar, sum ráðið hevur fingið, krevja næstan tríggjar ferðir meiri av meginkervinum. Tí er neyðugt at steðga á, sigur orkuráðið í tíðindaskrivi.



## Politikarar upp í fiskivinnuna

Her hjá okkum er tað rættiliga vanligt, at fólk við politiskum tilknýti eru virkin í vinnulívinum, og soleiðis er eisini í Grønlandi. Í seinastuni eru tveir leiðandi limir í Siumut komnir upp í fiskivinnuna. Mikiael Petersen,. sum er aðalskrivari í flokkinum, er vorðin nevndarlimur Arctic Prime Fisheries, og Simon Olsen, fyrrverandi landsstýrismaður í fiskivinnumálum, er komin upp í nevndina í Arctic Prime Production, skrivar Sermitsiaq.





*Nýggi miðnáms- og heilsuskúlin í Hovi*

# Tvær stórhendingar í Hovi

**Leygardagin var nýtt vatnverk tikið í nýtslu, og nú mikudagin verður nýggi miðnáms- og heilsuskúlin í Hovi latin Landsverk**

BYGGING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tá ið hetta bygdaráðið tók við fyri 4 árum síðani, settu tey sær fyri, at nú skuldi bygdin fáa reinsað vatn. Delmar Tausen, borgarstjóri, sigur, at hetta hevur verið tosað um í nógv ár, men nú eydnaðist tað. Leygardagin var almen móttøka uppi á nýggja reinsiverkinum, har borgarstjórin tendraði reinsiverkið.

Projektið gjørdist nakað størri, enn upprunaliga ætlað, tí Miðnáms- og heilsuskúlin er komin afturat. Vatnbrunnurin er 508 tons og er latin av Hans Tausen Olsen í Runavík. Betonarbeiðið til reinsiverkið hevur Suðurbeton gjørt og Hamarslag við Jens Sivart Djurhuus hevur smíðað bygningin. Gudmund Larsen hevur gjørt el-arbeiðið og Martin í Nesi málaraarbeiðið. Sjálvt reinsiverkið hevur NOMATEK í Havn latið.

TMT í Trongisvági hevur gjørt vatnleidningin oman í bygdina. Kommunan hevur gjørt eitt stórt arbeiði fyri at fáa fatur á rávatninum frá keldum uppi í hæddunum, og Delmar Tausen legði dent á, at her hevur ungdómurin í Hovi gjørt eitt stórt arbeiði. Ístak bjóðaði Hovs Kommunu vatnslangurnar, sum lupu av, aftaná á, at teir høvdu gjørt Hovs tunellina, og ungdómurin í Hovi, bæði gentur og dreingir, høvdu grivið 3 km av vatnslangu niður í haganum í samband við vatntøkurnar.

Samlaði kostnaðurin fyri vatnbrunn, reinsiverk og vatnleidningar liggur um 3,5 mill. kr., harav Landsverk hevur goldið 800.000 kr í samband við vatn til Miðnámsskúlan. Hetta má sigast at vera eitt stórt tak fyri kommununa, tá vit t.d. samanlíknað við, at samlaða fíggjarætlanin fyri 2009 javnvigar við knappar 3 mill. kr.

### Nýggi Skúladepilin í Suðuroy

Nú mikudagin handar MT Højgaard Landsverki nýggja skúladepilin í Suðuroy. Árni Winther Arkitektar hava teknað skúlan. Gólvvíddin er umleið 3.200 m², og samlaða næmingatalið kemur at vera umleið 200, javnt býtt í millum miðnámsskúlan og heilsuskúlan. Skúlin hevur ongar beinar ella paralellar síðir, alt bogar, og arbeiðsleiðarin hjá MT Højgaard nevnir, at tað alla tíðina hevur verið neyðugt at tryggja, at mátini passa. Spurdur um tað hevur verið trupult at byggja skúlan sigur hann, at tað í hvussu er hevur verið "en udfordring". Uppi frá hevur skúlin eitt skap, sum kanska kann minna um ein boomerang, og Delmar Tausen nevnir skemtiliga, at ein boomerang kemur altíð aftur. Skúlin skuldi fyrst liggja í Hovi, so varð hann fluttur til Vágs, og síðani kom hann heim aftur til Hov.

Uttanifrá liggur skúlin, sum ein stórur hamari í landslagnum, vakur og arkitektoniskt sera spennandi. Tá ið tú kemur inn í skúlan gerst tú bilsin yvir, hvussu nógv pláss er inni. Í miðjuni er eitt runt miðøki, har matarsalurin er niðast og bókasavn og lesiøki er í miðhæddini. Aftanfyri liggur ein stór fimleikarhøll. Frá hesum miðøki ganga tveir armar hvønn sín veg við stovum, serstovum og skrivstovum. Ein uppliving bara at ganga runt inni í skúlanum, og einki er at ivast í, at her vera sera góðar umstøður fyri næmingar og lærarar.

### Hov í framtíðini

Hov er ein av elstu bygdunum í Føroyum. Tað liggur eisini í sjálvum navninum, sum merkir eitt offurstað, har blóðoffur vóru ofraði til gomlu gudarnar. Bygdin er nevnd í Føroyingasøgu. Havgrímur búði í Hovi um somu tíð, sum Brestir og Beinir búðu í Skúvoy.

Hesi seinnu árini er fólkatalið fari at minka. Í 1801 búðu umleið 50 fólk í Hovi, og fyrst í 1900 talinum var hetta tal vaksið til gott 170. Men síðani 1991, tá fólkatalið var 168, er talið nú minkað niður til umleið 120.

Men nýggi Skúladepilin kemur at geva nógv arbeiðspláss, og Delmar Tausen vónar, at onkur av hesum fara at seta búgv í Hovi, so fólkatalið aftur kann vaksa og ikki minst fleiri børn kunnu koma í bygdina. Einki er at ivast í, at Skúladepilin kemur at hava stóran týdning fyri eina bygd sum Hov.



*Delmar Tausen, borgarstjóri í Hovi, og Jákup Magnussen, projektleiðari hjá Nomatek*